Ov lítil fiskur

Grønlendingar hava útvegað sær seks útlendsk skip at taka ímóti fiski frá útróðrarbátum í summar, men fiskiskapurin hevur verið so mikið vánaligur, at tvey av skipunum eru longu farin heimaftur.

Eitt portugisiskt skip, sum hevur ligið í Kangaatsiaq og tikið ímóti útróðrarfiski, er farið aftur til Portugals. Ætlanin var, at skipið skuldi taka ímóti 1200 tonsum, men nú tað fór avstaðaftur, hevði tað bert fingið góð 300 tons. Eitt norskt skip, sum hevur ligið nærhendis Nuuk og tikið ímóti fiski, er farið aftur til Noregs. Tað fekk heldur ikki tann fiskin, sum roknað varð við, sigur grønlendska útvarpið. Eitt annað norskt skip liggur við Narsaq, men higartil hevur tað fingið lítlan fisk.

Hini trý skipini fáa heldur meiri. Eitt nú hevur tað víst seg, at eitt av skipunum fær umleið 20 tons av útróðrarfiski um dagin, og er tað tvær ferðir meiri enn væntað.

Kavarar fingu viðhald

Ein nýggj frágreiðing staðfestir, at nógvir av teimum kavarunum, sum arbeiddu í oljuvinnuni, tá hendan vinnan tók seg upp í Noregi, høvdu alt ov ringar arbeiðsumstøður, og at nógvir teirra fingu varandi mein av arbeiðinum.

Í frágreiðingini stendur, at 18 av teimum umleið 350 kavarunum fingu so stórar sálarligar trupulleikar, at teir valdu at taka lívið av sær. Nógvir aðrir hava mist familjuna, aðrir húsini, og nógvir hava stórar rúsdrekkatrupulleikar. Frágreiðingin sigur, at hóast læknarnir hjá kavarunum ávaraðu myndugleikarnar, vildi eingin lurta eftir teimum.

Ein av kavarunum, tann 53 ára gamli Tom Halvorsen, sigur við norska útvarpið, at kavararnir vórðu misnýttir í sjeytiárunum, tá tað ráddi um at fáa fatur á oljuni á norska landgrunninum. Hann vísir á, at kavararnir vóru teir einastu, sum ikki vóru umfataðir av lógini um arbeiðsumhvørvi, og at hetta stóð við í fimtan ár. Í fleiri ár fingu myndugleikarnir at vita, hvussu vorðið var, uttan at nakað varð gjørt við tað, sigur hann. Nú heldur hann, at kavararnir eiga at verða skrásettir, so teir kunnu fáa endurgjald.

Lóg ímóti kríggi

Jóhannes Páll pávi Annar mælir nú altjóða samfelagnum til at smíða eina lóg, sum skal forða altjóða kreppum sum Irak-krígnum.

Pávin hevur leingi fýlst á, at tað ikki eydnaðist at loysa Irak-kreppuna við diplomatiskum tiltøkum, og hann heldur, at úrslitið av teirri kreppuni vísir, hvussu veik verandi altjóða løggáva er. Nýggjársdagur næsta ár er altjóða friðardagur, og pávin sigur, at tann dagin eigur altjóða samfelagið at seta sær sum mál at gera eina nýggja løggávu, sum skal forða kríggi.

-Mannaættin hevur eina stóra avbjóðing fyri framman. Eydnast tað ikki at skipa stovnar, sum kunnu forða kríggi, er vandi fyri, at hernaðarlig megi verður sterkari enn lógini, sigur pávin.

UTTAN ÚR HEIMI

Søgan fer at fyrigeva okkum

Tony Blair var eftir øllum at døma væl nøgdur aftan á røðuna, sum fekk nógvar lógvabrestir frá kongresslimunum

Tony Blair væntar, at søgan fer at fyrigeva USA og Bretlandi, at tey lupu á Irak.

IRAK-KRÍGGIÐ
Árni Joensen

Í einari søguligari røðu fyri amerikansku Kongressini fyrrakvøldið segði bretski forsætisráðharrin, at søgan fer at vísa, at USA og Bretland gjørdu rætt í at koyra stýrið hjá Saddam Hussein frá, sjálvt um tað skuldi víst seg, at irakski einaræðisharrin var ikki tann hóttan, sum amerikanarar og bretar søgdu hann vera.

Men Blair hevði eisini ein boðskap til George W. Bush, forseta og hinar amerikansku politikararnar.

- USA eigur ikki bert at leiða, men má eisini lurta. USA eigur ikki at sleppa Evropa upp á fjall, men heldur at samstarva við Evropa, og tað skal USA gera við at sannføra Evropa og ikki við at geva boð, segði Blair.

Hann legði eisini stóran dent á, at amerikanarar og bretar kunnu ikki fara úr Irak, fyrr enn uppgávan er loyst.

- Vit lovaðu irakum demokrati, og vit eiga ikki at fara haðani, fyrr enn vit hava hildið tað lyftið, segði Tony Blair, sum samstundis legði dent á, at bardagin ímóti yvirgangi verður ikki vunnin, fyrr enn tað eydnast at skipa varandi frið í Miðeystri.

Nógv færri deyðadómar í USA

USA er einasta demokratiska landið í Vesturheiminum, sum hevur deyðarevsing, men nú vísir ein uppgerð, at talið á deyðadómum har er minkað munandi.

DEYÐAREVSING
Árni Joensen

Sambært løgfrøðingum eru tað ymsar orsøkir til, at færri amerikanarar verða dømdir til deyða nú enn fyrr. Ein orsøk er, at eitt rættarmál, har ákæruvaldið krevur deyðarevsing, er sera kostnaðarmikið, og so hevur tað eisini víst seg, at nevningar ofta stúra fyri at døma ósek fólk til deyða.

Italski felagsskapurin Hands Off Cain sigur, at meiri enn 4.000 fólk vórðu avrættað aftan á deyðadóm í fjør, og at 71 av hesum avrættingunum vóru í USA. Tað merkir, at amerikanska talið er sera lítið samanborið við eitt nú Kina, har umleið 3.000 fólk vórðu dømd til deyða og avrættað í fjør. Í Iran var talið 316 og í Irak 214.

15 av teimum 50 amerikansku statunum hava framvegis deyðarevsing, men statsadvokaturin í Clasop í statinum Oregon, Josh Marquis, væntar, at færri og færri fólk verða dømd til deyða og avrættað í USA í framtíðini. Sjálvur heldur hann, at tað eru bert brotsmenn sum bumbumaðurin Timothy McVeigh, sum eiga at fáa deyðarevsing. McVeigh varð dømdur til deyða fyri eitt bumbuálop í Oklahoma City í 1995, sum kostaði 168 mannalív. Í juni í 2001 varð hann avrættaður við einari eiturinnspræning.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra kona, mamma, vermamma, omma, langomma og olduromma okkara

ELIN JACOBSEN (Ella)
ættað av Morskranesi
búsitandi í Tórshavn

andaðist í heiminum 14. juli, 90 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum mánadagin 21. juli kl. 13.00.

Familjunnar vegna
Jacob

Tey, ið ynskja at lata blómur ella krans, kunnu ístaðin lata Lindini eina peningagávu.

RAGNAR MAGNUSSEN
Timbur- & snikkaraarbeiði
t.d.
Umvælingar
Skifting av tøkum
Húsavørðsarbeiði
tel. 51 89 02

Alt til summarið
Skal tú hava eina sláimaskinu, plenuklippara, trykkspulara, skjótistiga ella eina blandimaskinu?

- Spyr hjá okkum, her kann tú handla til tann lága prísin
Tielbürger og Pro-trac sláimaskinur nú til óhoyrdar lágar prísir
O.K. HEILSØLA & MASKINUR
FO-430 Hvalvík · Tlf. 422394 · Fax 422395
e-mail: okhammer@post.olivant.fo

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

MAZDA PREMACY

6 sitipláss · krók
- nýggjar 17" alufelgur við nýggjum dekkum · myrkar rútar aftan · el-rútar · el-spegl
- hita í forsætum · centrallás · fjarstýrdan lykil · tokulyktir
- Panasonic CD/stereoanlegg · Vælhildin
• 1.8 bensin
• árg. 2002
• koyrt 26.000 km
prísur 158.900,-
BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla
Tlf 31 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

Politistur

Eitt arbeiði við avbjóðingum

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at menna st.

Høvuðsuppgávan hjá politinum er:

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og tryggd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur ikemur
- At lura eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgaranum.

Eitt arbeiði allan sólarringin

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistøðunum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.

Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er altaðíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð framanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

Løn og útbúgving

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiði – fast starv sum politistur.

Menning og karriera

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum og so eru eisini leiðsluskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.

Ynskir tú at vera við?

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelagnum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:

- Tú ert fylt 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

Meira kunning

Tey, ið ynskja meira at vita, finna hesar upplýsingar á okkara heimasíðu www.politi.fo og www.politi.dk. Á tí seinastu ber til at royna egnan kunnleika í mun til nakrar av upptøkuroyndunum. Í avgreiðsluni á politistøðini í Havn (má-frí millum kl. 9 og 15) fæst eisini kunning.

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. 4 politistar skulu setast í 2004. Umsóknarfreistin til hesar upptøkuroyndirnar er 1. september 2003.

Føroya Landfúti
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 14 48 - Fax 35 14 49
Heimasíða: www.politi.fo

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg